gult cyan magenta svart

HB eigur flestu spælararnar

U–16 landsli›i›, sum um tvær vikur á heimavølli skal verja føroysku æruna í NM kapping, hevur spælarar úr ikki færri enn ellivu feløgum

Í vikuni eftir ólavsøku ver›ur nógv lív í Gundadali. Tá ver›ur NM kapping fyri U–16 landsli› har. Luttakandi londini ver›a Finnland, Ongland, Danmark og Føroyar, sum ver›a í bólki A. Í bólki B ver›a Ísland, Svøríki, Skotland og Noreg.

Bólkadystirnir ver›a mánadagin 31. juli, t‡sdagin 1. august og hósdagin 3. august. Spælt ver›ur bæ›i á ni›ara vølli og á ovara vølli. Dystirnir ver›a klokkan 14.30 og klokkan 17.00, og Føroyar spælir allar dagarnar klokkan 17. Mótstø›uli›i› mánadagin ver›ur Danmark, t‡sdagin ver›ur spælt móti Finnlandi, og hósdagin er Ongland á skránni.

Dystirnir um endaplássini eru á skránni fríggjadagin 4. august. Tá ver›ur spælt um 7. og 5. plássi› klokkan 13.00, og klokkan 17.00 ver›ur spælt um 3. plássi›. Finalan ver›ur á Tórsvølli klokkan 19.00.

Øll fer›aløgini skulu búgva á Hotel Føroyum. Fremmandu spælararnir koma til Føroya sunnudagin 30. juli, og teir fara avsta› aftur 5. august. Tó fara eingilska og skotska li›i› ikki avsta› aftur fyrrenn 6. august.

Umframt dystirnar ver›ur nógv venjing á skránni. Hon fer at ganga fyri seg á vøllinum á Argjum.

Hópurin

Mattias Davidsen er venjari hjá føroyska li›num. Hann og spælararnir, sum eru føddir í 1984 ella í 1985, hava gjørt nógv vi› venjingina. Nógvir spælarar hava veri› til venjingar, men nú er naka› sí›ani, at teir fóru at sálda frá, og í vikuskiftinum vóru bara teir í venjingarlegu á Svangaskar›i, sum eru í endaliga hópinum.

Teir átjan spælararnir, sum hesa fer› skulu verja føroysku æruna, eru málverjarnir Gutti Harryson, HB, og Arnfinn í Bartalstovu, GÍ. Hinir spælararnir eru Eli Thorsteinsson, Rani D. Christiansen, Frank Poulsen, Bjarni Jørgensen og Rókur F. Jespersen úr HB, Ingi Højsted og Mortan Johannesen úr B36, Andy Olsen og Bjarki Danielsen úr NSÍ og Marni Djurhuus, EB/Streymur, Tummas Pauli Olsen, B71, Hanus Eliasen, ÍF, Jann Ingi Petersen, B68 , Rasmus Nolsøe, TB, Magnus Skoralí›, LÍF, og Símun Samuelsen úr VB.

Sum yvirliti› vísir, so eigur HB nógv teir flestu spælararnar. Ikki færri enn seks spælarar ella tri›ingurin av átjan manna hópinum er úr HB. Hetta er ein undirstriking av, at av øllum feløgunum er HB nógv best fyri í ungdómsfótbóltinum.

Jógvan Martin Olsen hevur umsjón vi› øllum dreingja– og unglinga landsli›sarbei›i hjá FSF. Hann hevur ofta tiki› til, at ta› eigur at roknast vi›, at eitt so stórt felag sum KÍ eigur at hav tríggjar ella f‡ra landsli›sspælarar á hvørjum li›i. Á U–17 landsli›num, sum í næstsí›stu viku var í T‡skalandi, vóru fleiri gó›ir spælarar úr Klaksvík á li›num.

Hóast teir í Klaksvík tey seinnu árini hava gjørt nógv vi› ta› í yngru deildunum, so roynast árgangirnir, sum nú eru í dreingjadeildini, ikki væl. Ta› sást aftur í, at KÍ eigur ikki li› millum teirra, sum nú kappast í FM bólkinum, og ta› sæst aftur í, at teir ongan spælara eiga á U–16 landsli›num. Merkisvert er ta› eisini, at teir tólv spælararnir, sum ikki eru úr HB, koma frá so nógvum feløgum og so nógva sta›ni frá í landinum. B36 og NSÍ ver›a vanliga saman vi› HB og KÌ rokna› at vera tey stóru feløgini. B36 og NSÍ eiga tveir spælarar í part á U–16 landsli›num. Hinir spælararnir koma frá átta ymiskum feløgum.

Royndirnar

Talan er so at siga um eitt heilt n‡tt li›. Tríggir av spælarunum, sum skulu royna seg í NM kappingini hesa fer›, vóru vi› í NM kappingini, sum í fjør var í Onglandi. Teir eru Jann Ingi Petersen, Rani D. Christiansen og Sámal J. Samuelsen. Jann Ingi var longu í fjør fastur ma›ur á li›num, me›an hinir bá›ir fyri ta› mesta sótu á beinkinum.

Tá U–17 landsli›i› fyri tveimum vikum sí›ani var í T‡skalandi vóru fleiri av spælarunum, sum nú skulu spæla á U–16 landsli›num, vi›. Umframt Jann Inga Petersen og Rana D. Christiansen vóru teir Hanus Eliasen, Gutti Harryson, Arnfinn í Bartalsstovu, Frank Poulsen og Bjarni Jørgensen.

Í Onglandi í fjør taptu føroyingar í fyrsta dystinum 5–0 móti Noregi. Í næsta dystinum greiddu teir málleysan javnleik móti Danmark, og so taptu teir 2–0 móti Finnlandi. Í dystinum um sjeynda plássi› vann Ísland 2–1 á Føroyum. Hjalgrím Elttør úr KÌ leg›i Føroyar framum vi› brotssparki› í 19. minutti.

Í 1998 var EM undankapping fyri U–16 landsli› í Gundadali. Ta fer›ina vóru Føroyar í bólki saman vi› Wales, Noregi og Finnlandi, sum vann bólkaspæli›. Av gó›um orsøkum er eingin av føroysku spælarunum, sum vóru vi› ta fer›ina, í føroyska hópinum hesa fer›.

jh

Venjarin hjá U-16 li›num, Mattias Davidsen, hevur díkt á dreingirnar seinastu tí›ina

gult cyan magenta svart

Dómararnir eru illir

Donsku dómararnir hótta við at fara í verkfall, um teir ikki fáa nógv meiri í løn, enn teir hava fingið higartil

Tað er ikki ókent í t.d. Italia, og í Føroyum hava vit havt ein feril av tí fyrr í summar. Og nú hótta donsku dómararnir við, at um teir ikki fáa meiri í løn, so vilja teir ikki døma, tá fyrsta umfarið í superliguni er á skránni í vikuskiftinum.

Og tað sær svart út. Feløgini halda, at krøvini hjá dómarunum eru so ógvuslig, at tað verður ikki talan um at siga ja til tey. Nú fær ein dómaratríbólkur sjey túsund krónur fyri at døma í superliguni. Dómararnir krevja at fáa fjúrtan túsund krónur, og Kim Milton Nielsen, sum er samráðingarleiðari hjá dómarunum sigur, at tað verður ikki talan um at boyggja seg. Dómararnir siga, at nú er tað liðugt við at spæla fittir. Teir síggja seg sum týðandi part av fótbóltinum, sum tað eru nógvir pengar í, og teir dugu ikki at skilja, at tað ikki eru ráð til at løna teimum orduliga, tá feløgini hava ráð til so mangt annað.

Í DBU siga teir seg ikki hava nakra neyðloysn klára. Um eingin semja verður gjørd í hesi vikuni, so verður eingin superligu fótbóltur í vikuskiftinum. Men tað man ivaleyst fara at laga seg, sum tað plagar, t.d. í Italia, har ósemjur av hesum slagnum plaga at verða loystar stutt undan, at dystirnir eru ásettir at verða.

Í 1988 var kuril á tráðnum millum dómararnar og felagið hjá divisiónsfeløgum, sum eru teir, ið rinda dómarasamsýningarnar. Ta ferðina varð ein loysn funnin 20 tímar undan at dystirnar vórðu ásettir at vera.

Í føroysku kappingini er samsýningin til dómaratríbólkin 1.600 krónur, tá talan er um 1. deildardyst á mannfólkasíðuni. Samsýningin fevnir um dømingina og um allar aðrar útreiðslur.

JH

Leiftur slapp av botnsessinum

Men teir eru framvegis illa sperdir í føroyska felagnum á Ólafsfirði, og nú er Sámal Joensen skaddur

Tað gongur meiri enn striltið hjá Jens Martini Knudsen og hansara monnum í Leiftri á Ólafsfirði. Tey seinastu árini hava teir kappast um pláss í europeisku kappingunum, men nú kunnu teir ikki hugsa um annað enn at sleppa undan niðurflytingar hóttanini.

Hesar síðstu dagarnar hava teir spælt tveir dystir. Samlaða úrtøkan var eitt stig. Tað er einki at reypa av, men tað var kortini so mikið, at Leiftur fyri fyrstu ferð í langa tíð er sloppið av aftasta plássinum.

Teir hava fýra stig. Tað hevur Stjarnan eisini. Málmunurin hjá báðum feløgunum er minus átta, men Leiftur er næstaftast, tí teir hava skorað fleiri mál. Málmunurin hjá Leiftri er 6–14, og hjá Stjarnuni er hann 3–11.

Tríggir føroyingar vóru við hóskvøldið, tá teir á útivølli taptu ímóti Fram, og teir somu tríggir vóru við, tá teir á heimavøllinum sunnukvøldið spældu 2–2 ímóti Una Arge, sum vitjaði aftur á gamla heimavøllinum saman við liðfeløgunum í ÍA av Akranesi.

Jens Martin Knudsen, John Petersen og Jens Erik Rasmussen spældu báðu ferðirnar. Sámal Joensen var ikki við. Hann er plágaður av einum vøddaskaða, sum hevur hildið honum burturi frá venjingina. Hann fór aftur at venja í gjár.

Í útsetta dystinum frá 8. uimfarinum hóskvøldið á Laugardalsvøllinum í Reykjavík var Fram á odda 3–0, áðrenn Leiftur í næstsíðsta minuttinum pyntaði um. Jens Erik Rasmussen royndi seg við langskoti, málverjin hálvbjargaði, og Ingi H. Hannisson stútaði returbóltin í kassan.

Fram skoraði í 39., 49. og 87. minutti. Í 39. minutti fingu teir brotsspark, men Jens Martin Knudsen bjargaði royndini úr ellivu metrum.

Sunnukvøldið vóru eingir føroyingar ímillum málskjúttarnar. ÍA var frammanfyri 1–0 í steðginum, og teir vóru eisini frammanfyri 2–1, áðrenn Leiftur javnaði og tryggjaði sær kærkomna stigið.

ÍA er á fjórða plássinum. Teir hava fjúrtan stig, og málmunurin hjá teimum er 7–6. Tað kann ikki sigast, at nógv mál verða skorað í íslendskum fótbólti!

Leiftur skal spæla aftur 23. juli. Tá verður mótstøðuliðið Fylkir.

Tómas Ingi høvuðsleikari

Allan Mørkøre er ikki í ÍBV longur, og harvið er føroyski áhugin fyri felagnum úr Vestmannaoyggjnunum sjálvsagt ikki tann, sum hann hevur verið.

Sunnukvøldið var ÍBV á útivølli ímóti Fylkir, sum púra óvæntað hevur verið oddalið í Íslandi og sum ongan dyst hevði tapt undan sunnudegnum.

ÍBV vann 3–2 í Reykjavík, og Tómas Ingi Tómasson, sum er komin úr AGF, og sum hevur troðkað Allan Mørkøre úr álopinum hjá ÍBV, var høvuðsleikari. Longu í 1. minutti skoraði hann til 1–0, og tá eitt korter restaði var hann aftur í miðdeplinum. Tá varð hann útvístur, tí hann hevði hevnt seg!

JH

Rógvi vann sum væntað

Rógvi Johansen vann sera sannførandi súkklukappingina á vestanstevnu, og hann var eitt umfar frammanfyri sínar nærmastu kappingarneytar

Stefan í Skorini

Rógvi Johansen hevur sent eina ávaring út til allar hinar súkklararnar, sum fara at luttaka í Statoil kring Føroyar, ið byrjar mikudagin. Rógvi er í góðari venjing í løtuni, og tað hevur hann víst bæði á jóansøku og nú á vestanstevnu, har hann hevur vunnið sannførandi.

Rógvi kann tó ikki vinna Grand Prix Føroyar, av tí at hann ikki hevur luttikið í øllum kappingunum. Rógvi býr niðri í Danmark og venur við einum felagi har.

Gunnar Dahl-Olsen kom næstur á mál og fekk harvið 34 stig. Johan Brend kom á mál sum nummar trý. Teir vóru báðir eitt umfar aftanfyri Rógva Johansen. Koyrt varð fyrst í 50 minuttir, og síðani skuldu súkklararnir koyra eitt umfar afturat.

Sverri Mohr Edvinsson varð nummar fýra, og Kári Brattaberg var fimtur um málstrikuna. Teir vóru báðir trý umfør aftanfyri Rógva. Kári Brattaberg var annars tann einasti súkklarin, sum veruliga kundi hótta Gunnar Dahl-Olsen. Av tí at Kári bert fekk 22 stig á vestanstevnu, er Gunnar nú nærum Grand Prix Føroyar vinnari.

Í seinastu kappingini skal Gunnar Dahl-Olsen bert hava 9 stig fyri at tryggja sær samanlagda sigurin. Skal Kári Brattaberg hava nakrar vónir um at vinna, skal hann sigra í seinastu kappingini. Støðan er í løtuni tann, at Gunnar Dahl-Olsen er klárt á odda og hevur 148 stig. Størri spenningur er harafturímóti um, hvør gerst nummar tvey. Kári Brattaberg hevur 116 stig, og Sverri Mohr Edvinsson hevur 112 stig, so teir fara at skeita eitt sindur eftir hvørjum øðrum í tí seinastu kappingini.

Næstu dagarnar fara súkklararnir óivað ikki at hava Grand Prix Føroyar fremst í huganum, tí mikudagin fer Statoil kring Føroyar í gongd. Hetta er størsta súkklukappingin í Føroyum, og fleiri súkklarar úr Danmark koma hendavegin at kappast. Koyrt verður hvønn dag frá 19. til 23. juli.

Jákup og teir bíða

Herfølge spælir Super Cup í kvøld, men teir sleppa ikki at royna seg í landskappingini fyrrenn komandi mikukvøld

Í kvøld klokkan 17.30 verður høvi at síggja Jákup Mikkelsen í sjónvarpinum. Hesa tíðina av árinum er klokkan 17.30 ikki á kvøldi, men heldur mitt á degi – í hvussu so er hjá okkum í Føroyum.

Men hvussu so er og ikki, so skal Herfølge spæla í klokkan 17.30. Tey, sum síggja TV3+ rásina, hava møguleika at fylgja við.

Talan er um tað, teir í Danmark kalla Super Cup. Meistaraliðið Herfølge hevur heimavøll ímóti steypavinnarunum úr Viborg.

Jákup Mikkelsen hevur verið skaddur tað nógva av tíðini, sum teir í Herfølge hava brúkt seg at fyrireika seg til nýggja kappingarárið. Hann varð skaddur annan dagin sum teir vandu, men nú er hann tøkur aftur.

Í teimum fyrstu venjingardystunum gekk illa hjá Herfølge. Millum annað taptu teir 3–0 í Valby ímóti Frem úr næstbestu deildini. Sunnudagin spældu teir í dystinum, sum populert verður nevndur slagið um Køge kommunu.

Køge, sum inntil Herfølge rættuliga fór at gera um seg í bestu deildini, var fremstta felagið í kommununi av sama navnið, vann 2–0, tá liðini hittust næstsíðst, og hóast talan bara var um venjingardyst, so hava teir funnið nógva fragd í hesum.

Men sunnudagin setti meistaraliðið alt upp á pláss. Teir vunnu 3–1, eftir at tað í hálvleikinum hevði staðið á jøvnum 1–1.

Fleiri flytingar

Sambært upprunaligu skránni fyri superliguna skuldi Herfølge spæla á heimavølli sunnudagin ímóti AaB, sum var meistari í 1999. Men nú er tann dysturin fluttur til annað mikukvøld. Orsøkin er tann, at AaB skal spæla á útivøli í Intertoto Cup kappingini í vikuskiftinum.

Talan verður ivaleyst um avgreiðsludyst hjá AaB. Í vikuskiftinum høvdu teir vitjan av Udinese, og italska liðið fór avstað aftur við 2–0 sigri í viðførinum.

Sambært upprunaligu skránni skal Herfølge spæla ímóti Brøndby sunnudagin 20. august. Nú er tann dysturin fluttur til fríggjakvøldið 18. august. Hetta kemst av, at Herfølge skal spæla í triðja innleiðandi umfarinum í Europa Cup mikukvøldið 23. august.

Eru spentir

Í fjør royndi Herfølge seg í Intertoto Cup, men tað gekk einki serligt. Nú skulu teir stríðast fyri at koma í bólkaspælið í meistarakappingini. Treytin fyri at koma í peningaríka landið er, at teir vinna samanlagt á heimavølli og útivølli í einum umfari.

Jákup Mikkelsen sigur, at teir fara av fullum huga í kappingina í tí vón, at tað skal eydnast, men teir taka hetta sum eitt upplivisli, tí mótstøðan verður øgiliga stór.

Lutakastið verður nú fríggjadagin. Tá verður greitt, hvørji lið vera komin víðari úr fyrsta innleiðandi umfarinum, sum verður liðugt spælt í annaðkvøld – millum annað Reyða Stjørnan og KÍ.

UEFA hevur flokkað tey liðini, sum skulu taka lut í triðja innleiðandi umfarinum, og tað er greitt, at mótstøðuliðið hjá Herfølge verður eitt av sterku feløgunum í Europa. Millum møguligu mótstøðuliðini eru Milan og Inter úr Italia, Valencia úr Spania og Lyon úr Fraklandi, Feyenoord úr Hollandi, FC Porto úr Portugal og Leeds úr Onglandi.

Um tað miseydnast hjá Herfølge at sleppa upp í part í bólkaspælinum, so sleppa teir kortini at royna seg í Europa Cup. Tey liðini, sum tapa í triðja innleiðandi umfarinum, sleppa upp í part í fyrsta umfarinum í UEFA Cup.

JH